

Avleiðing av uppsagnunum:

# Servitan fyri okurssprís

**Ráðgevin í Innlendismálaráðnum, Bergur Berg, fýlist á framferðarháttin hjá landsstýrinum í sambandi við uppsagnirnar í miðfyrisitingini. Ein avleiðing av hópuppsagnunum kann verða, at aðalráðini verða noydd at keypa tænastur uttan fyri fyrisitingina fyri okurssprís, tí arbeiðsorkan ikki røkkur, sigur Bergur Berg**

SKERJINGAR Í MIÐFYRISITINGINI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Tað er framvegis ikki kom~in nøkur grundgeving fyri uppsøgnunum. Tað minsta, landsstýrið átti at gjørt, er at gjørt sær greitt, hvar sparingarnar skulu setast í verk, og harvið hvør vinningurin og hvør missurin verður við sparingunum í fyrisitingini.

Bergur Berg hevur síðan 1993 starvast hjá tí almenna. Fyrstu árini arbeiddi hann á Almannastovuni, og síðan 1998 hevur hann starvast í miðfyrisitingini. Hann heldur lítið um framferðarháttin hjá landsstýrinum, sum seinasta mikudag gjørdi av at senda 16 fólk úr miðfyrisitingini til hús.

### Avleiðingarnar

Bergur Berg heldur ikki, at landsstýrið er farið skilaliga fram í málinum. Stjórnmálafrøðingurin fýlist á, at landsstýrið ikki hevur givið sær stundir til at greina játtanina til miðfyrisitingina, áðrenn avgerðin um lønarniðurskurin á 10 % varð tikin. Fíggjarorkan í mun til starvsfólkatalið var ymisk í ymsu ráðunum, so tí rakar ein jøvn skerjing sera ójavnt.

– Hóast vit nú verða færri í tali, halda lógarøkini á við at vera líka rúgvumikil. Einasti munurin verður, at vit verða færri fólk at umsita lógirnar, sigur hann.

Bergur Berg ber ótta fyri, at advokatar og onnur uttan fyri miðfyrisitingina fara í størri mun at loysa uppgávur fyri fyrisitingina.

– Á Almanna- og heilsumálaráðnum veit eg, at tvey løgfrøðingastørv eru spard burtur, samstundis sum stórur tørvur er á teimum, tí Almanna- og heilsumálaráðið skal í næstum broyta fleiri tungar lógir og seta nógvar kunngerðir í verk. Við færri starvsfólkum kann væl hugsast, at tað verður neyðugt at fara út í býin at keypa fólk at gera arbeiðið, tí arbeiðsorkan í aðalráðum røkkur ikki til, sigur fulltrúin.

Hann vísir á, at hóast fólk uttan fyri miðfyrisitingina formliga hava fakliga førleikan, er væntandi, at góðskan ikki verður hin sama, tí fólkini hava ikki somu vitan og royndir á teimum ymisku økjunum sum starvsfólkini á aðalráðunum. Tað er sum at taka ein rokskipara beint inn til at vera kapteynur á Norrønu.

– Prísurin verður eisini sjey-átta ferðir hægri enn um arbeiðið varð gjørt í aðalráðunum, men góðskan verður avgjørt ikki fyrstafloks. Til ber tí at spyrja, hvat landsstýrið vinnur við at senda fólkini til hús, spyr Bergur Berg.

Talið av aðalráðum síðan 1994




### Minni enn í grannalondum

Ein av afturvendandi útsagnunum um miðfyrisitingina seinastu dagarnar hevur verið, at hon er vaksin nógv seinastu árini, og tí er tað í tøkum tíma, at politiski myndugleikin fremur nakrar skerjingar, so miðfyrisitingin kann fáast í rættlag aftur. Bergur Berg er ikki samdur við teimum, sum siga, at føroyska miðfyrisitingin er ov stór.

– Tað veldst um eygað sum sær. Tað er rætt, at hon er vaksin nakað, men hon er framvegis lítil um vit samanbera okkum við hini norðurlondini og Grønland. Meðan vit í Føroyum sita hvør í sínum lagi og umsita stór lógarverk, umsita 7-8 akademikarar kanska bara eina einstaka paragraf í samsvarandi lógarøki í Danmark. Hvør fulltrúi í Føroyum situr tí einsamallur inni við eini servitan á teimum ymisku lógarøkjunum, og missa vit bara eitt fólk, fer hetta fólki avstað við nógvari vitan, sum tað tekur ár at fylla út aftur, sigur hann.

Fulltrúin í Innlendismálaráðnum vísir á, at arbeiðsbyrðan hjá starvsfólkum í miðfyrisitingini øktist munandi eftir, at Stýrisskipanarlógin og Fyrisitingarlógin og lógin um Alment innlit vórðu settar í verk. – Bara tað at fyrireika øll svarini til allar teir spurningarnar sum tingmenn seta landsstýrismonnunum, man haraftrat taka eini 10% av arbeiðsorkuni hjá fulltrúunum.

Bergur Berg heldur tí, at tað gevur eina ranga mynd av veruleikanum, tá fólk bert hyggja at starvsfólkatalinum í miðfyrisitingini uttan at hyggja nærri at øktu arbeiðsbyrðuni í miðfyrisitingini seinnu árini.

– Nakað heilt annað er, at tað kann væl vera, at miðfyrisitingin trongir til stórar broytingar, sigur Bergur Berg. Verandi bygnaður varð skundaður ígjøgnum eftir sera stuttari tíð, bara við tí endamáli at styrkja miðfyrisitingina. Grundgevingin tá var, at Stýrisskipannarlógin gjørdi at tað var neyðugt. Man skuldi fyrst gera eina roynd, og so skuldi bygnaðurin eftirmetast um tvey ár. Men tað er ikki gjørt enn. So heilt nógv trongir við vissu til at verða skorið til umaftur, men ongin veit hvat ella hvar, tí ongin eftirmeting er gjørd – tilvildin ræður.

### Skulu taka tøk

Løgmaður og landsstýrismenn hava víst á í fjølmiðlunum, at versnandi búskaparstøðan hevur við sær, at fleiri fólk innan tað almenna kunnu vænta at verða søgd úr starvi komandi mánaðirnar. Løgmaður segði í viðtalu við Sosialin í seinastu viku, at øll verða noydd at taka eitt tak, og tað verður miðfyrisitingin eisini.

*Skal miðfyrisitingini ikki eisini taka eitt tak***?**

– Jú sjálvandi skal hon tað, tá tað er tað sum politikararnir vilja. Vit átti tó kortini at fingið at vita, hví hesar sparingar skulu fremjast, og hvør ætlanin er við teimum. Tað er ikki ein grundgeving, at pástanda at fyrisitingin er ov stór, og tí skal skerjast uttan at grundgeva fyri, hví ella hvar hon er ov stór, ella hvussu uppgávurnar annars skulu loysast. Tað at politikararnir ikki hava ynskt at raðfesta skerjingarnar hevur gjørt at skerjingarnar raka fullkomiliga tilvildarliga, heldur Bergur Berg.

– Tað er til dømis ikki tí, at tey hava ov nógvar løgfrøðingar, at Almanna- og heilsumálaráðið sker tvey løgfrøðingastørv burtur. Tey hava mær vitandi tvørturímóti ov fáar, men beint tá høvdu tveir góðir løgfrøðingar sagt seg úr starvi, og tí var tað so nógv læ͏ttari at taka tey bæði størvini burtur, heldur enn at koyra fólk úr starvi. Og tað er tað sama allastaðni. Úrslitið er, at starvsfólkasamansetingin í miðfyrisitingini broytist á ein hátt sum yvir høvur ongin hevur ætlað. - Er tað rationalisering, so er tað ið hvussu so er eitt heilt nýtt slag, vísir hann á.

Bergur heldur, at høvdu politikararnir torað at raðfest, hevði tað verið nógv lættari hjá aðalstjórunum at skorið starvsfólkini til tað óynskta virksemið burtur - og tað hevði verið lætt hjá teimum uppsøgdu at skilt grundgevingarnar fyri uppsøgnunum, og tí hevði tað kanska borið til hjá teimum sum enn hava síni størv, at arbeitt hugagóð víðari.

Nú hava aðalstjórarnir fingið eina óneyðuga stóra uppgávu við at raðfesta umaftur - og royna at motivera tey starvsfólkini sum eru eftir.

# Rætt at skerja miðfyrisitingina

**– Veruleikin er, at vit hava eina fíggjarlóg, sum ikki kemur at javnviga, og tí má okkurt gerast. Eg haldi tað er skilagott av samgonguni at hon varskógvar, at hon vil ganga fremst og fyrst sópa fyri egnum durum, vísir stjórin í Vinnuhúsinum á**

SKERJINGAR Í MIÐFYRISITINGINI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Eins og í vinnuni skal tað almenna eisini tillaga seg eftir búskaparligu viðurskiftunum. Miðfyrisitingin er nógv økt seinastu árini, og sparingin á 10% kemur ikki óvæntað, tí miðfyrisitingin má eins og almenni sektorurin laga seg til broyttu umstøðurnar, heldur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

Stjórin í Vinnuhúsinum sigur seg einki minnast til, at politiski myndugleikin síðan kreppuna hevur tikið nøkur tøk fyri at effektivisera ella rationalisera umsitingina.

– Veruleikin er, at vit hava eina fíggjarlóg, sum ikki kemur at javnviga, og tí má okkurt gerast. Eg haldi tað er skilagott av samgonguni at hon varskógvar, at hon vil ganga fremst og fyrst sópar fyri egnum durum, vísir stjórin í Vinnuhúsinum á.

Hann leggur afturat, at boðskapurin hjá Vinnuhúsinum hevur altíð verið uttan mun um talan er um ringar ella góðar tíðar, at tað er neyðugt hjá øllum at fyrihalda seg til búskaparliga veruleikan og tillaga raksturin eftir støðuna.

– Tað er fyrisitingin eisini noydd at gera, heldur Jan Mortensen

### Bíligari loysnir

Vinnuhúsið hevur javnan víst á, at almenna fyrisitingin er vaksin ov nógv, og tørvur er á eini eftirmeting av fyrisitingini.

Á hinari síðuni er viðtala við Berg Berg, har hann ger vart við, at tað er neyðugt at hyggja at øktu arbeiðsbyrðuni hjá miðfyrisitingini, áðrenn dómur verður sagdur, hvørt ov nógv starvsfólk eru miðfyrisitingini ella ei.

*Eiga tit ikki at hyggja nærri at arbeiðsbyrðuni hjá fyrisitingini, áðrenn tit fella dóm yvir hana?*

Jú tað er púra rætt. Ein afturvendandi trupulleiki hjá smærri samfeløgum er, at tey uttan mun hvussu smá tey er, hava tey tørv á somu funktiónum sum størri samfeløg. Avbjóðingin hjá smærri samfeløgum er tí altíð at finna egnar bíligar loysnir. heldur enn at kopiera loysnir hjá øðrum samfeløgum, heldur Jan Mortensen.

### Plenuklipparin

– Landsstýrið fer púra hugsjónarleyst runt við plenuklipparanum og klippur plenuna javnt snøgga, uttan nakað sum helst mið ella mál.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð, hevði í Sosialinum í gjár lítið gott at bera framferðarháttinum hjá landsstýrinum í samband við sparingarnar í miðfyrisitingini.

Jan Mortensen ynskir ikki at taka dagar ímillum um landsstýrið hevur nýtt sonevnda plenuklipparin, tá sparingarnar í miðfyrisitingini vórðu framdar.

– Tá tú fremur sparingar er rættast at hyggja at hvørjum øki sær. Tað er neyðugt at kanna hvørjar deildar kunnu niðurleggjast ella hvørjar umrokeringar kunnu gerast. Eg dugi ikki at siga um plenuklipparin er nýttur í hesum føri, men uttan mun um hann er nýttur, so er tann framferðarhátturin óheppin, vísir stjórin í Vinnuhúsinum á.

### Leikluturin hjá fjølmiðlum

Jan Mortensen finst hvasslig at leiklutinum hjá føroysku fjølmiðlunum í samband við uppsagnir hjá tí almenna.

– Innan vinnuna eru nógv fólk við at gerast troytt av, at hvørja ferð onkur verður uppsagdur innan tað almenna eru allir fjølmiðlarnir á gosi. Hópuppsagnirnar á eitt nú Føroya Tele og innan alivinnuni tykjast ikki hava sama áhuga hjá fjølmiðlunum, heldur stjórin í Vinnuhúsinum

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum verður skrivað, at uppsagnirnar í miðfyrisitingini er ein natúrlig gongd, tí heili 75% av føroysku virkjunum høvdu eina afturgongd frá 2002 til 2003.

– Virkini noyðast at taka avleiðingar av minni arbeiði og fólk verða send til hús. Hetta sæst aftur í tølunum fyri arbeiðsloysi, men hetta fær ongantíð nakra fjølmiðlaumtalu í mun til uppsagnirnar hjá tí almenna, stendur á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.

# Miðfyrisitingin er økt góð 60%

**Síðan 1996 er starvsfólkatalið í miðfyrisitingini økt úr 98 fólkum til 160 fólk**

SKERJINGAR Í MIÐFYRISITINGINI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fíggjarmálaráðið hevur gjørt eina uppgerð yvir tali av starvsfólkum í miðfyrisitingini síðan bygnaðarbroytingar hjá Finn Norman Christensen vórðu framdar í verki í juni mánaði í 1996.

Sambært uppgerðini hjá Fíggjarmálaráðnum er starvsfólkatalið í miðfyrisitingini síðan 1996 økt við góðum 60 %. Í juni 1996 arbeiddu 98 fólk í miðfyrisitingini og í dag starvast 160 fólk í miðfyrisitingini. Talið 160 er uppgjørt, áðrenn landsstýrið framdi sparingarnar seinastu mikudag

### Leystlig meting

Aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum, Petur Alberg Lamhauge, ger vart við, at talan er um eina leystliga meting, tí tað er eingin eintýðug definitión av miðfyrisitingini. sum hann málber seg. Talan er tí nærmari um eina leystliga meting, sigur Petur Alberg Lamhauge

# Útsagnir um miðfyrisitingina

*– Er endamálið(við uppsøgnunum í miðfyrisitingini) at fremja konjunkturtiltøk, fyri at leggja upp fyri minkandi inntøkunum í løtuni, so er ætlanin púra burturvið*
*16.09.04 Viðtala í Dimmalætting við Hermann Oskarsson, formaðurin í Búskaparráðnum*

*– Vit hava eina sterka fyrisiting, sum skal spara 12 milliónir. Hon skal ikki missa fólk, men halda somu tænastu sum higartil.*
*26.05.04 Viðtala í Sosialinum við løgmann Jóannes Eidesgaard á tíðindafundi um fyrstu 100 dagarnar hjá ABC-samgonguni í Sosialinum*

*– Miðfyrisitingin er nógv styrkt seinastu 10 árini, og ein sparing á 10% rokkar ikki við hetta. Miðfyrisitingin má eins og allur almenni sektorurin lagast til broyttu umstøðurnar*
*20.09.04 Heimasíðan hjá Vinnumálaráðnum www.industry.fo*

*– Hópuppsagnirnar í miðfyrisitingini eru ein liður í royndunum hjá ávísum politikarum at føra okkum aftur í 80 árini, har tilvild og ábyrgdarloysi ráddi í politisku skipanini.*
*15.09.04 Fyrrv. formaður í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum, Niels Winther í ÚF*

*– Búskaparligi veruleikin er, at vit eru noydd at tátta í á fleiri økjum. Vit verða øll noydd at taka eitt tak, og tað má miðfyrisitingin eisini.*
*17.09.04 Viðtala í Sosialin við løgmann Jóannes Eidesgaard*

*Tað tykist sum um, at um onkur verður uppsagdur í høvuðsstaðarøkinum og tá serliga í teim føstu almennu størvunum, ja, so er høvuðsstaðarpressan á gosi og tosa verður um sálarliga hjálp og kreppu í landinum.*
*16.09.04 Leiðarin í Norðlýsinum*

*Landsstýrið fer púra hugsjónarleyst runt við plenulipparanum og klippur plenuna javnt snøgga, uttan nakað sum helst mið ella mál.*
*20.09.04 Viðtala í Sosialinum við Gunnleiv Dalsgarð, formann í Starvsmannafelagnum*